DAGSINS MEINING

Útlendingamálið

Málið um útlendingarnar var um at fara heilt av leið, og tað er tí í tøkum tíma, at steðgað verður á, so myndugleikarnir fáa summa seg. Hetta hevur allan vegin verið eitt løgið mál. Hvussu ber tað til, at hesin spurningur knappliga tekur seg upp nú? Hví verður farið so harðliga, ja, næstan náðileyst fram ímóti nøkrum heilt fáum útlendingum og hví er alt hetta málið handfarið so óhegnisliga, at tað nærkast tí ósømiliga? Her eru nógvir spurningar, men fá svar. Nógv teir flestu útlendingarnir eru ikki komnir higar av sínum eintingum, men teir eru komnir, tí boð hava verið eftir teimum. Teir flestu eru heintaðir higar at styrkja ávís ítróttarfeløg. So hava teir herumframt verið noyddir at taka arbeiði í fiskivinnuni ella í øðrum vinnum. Nakrir hava verið her í fleiri ár og hava fingið familjuna til Føroya. Hetta er ein mannarættur, sum einki landsstýri kann sýta innflytarum.

Men aftur til spurningin um timingina. Hví uppstendur trupulleikin júst nú? Hetta hevur ivaleyst nakað at gera við, at at eitt ávíst arbeiðsloysi hevur tikið seg upp serstakliga í fiskivinnuni á landi, har útlendingarnir vanliga starvast. Men hetta hevur kanska eisini nakað at gera við valstríðið seinast, har ein av flokkunum rak upp undir hetta, at ov nógvir útlendingar vóru í landinum. Sama ger. Tað, sum nú er umráðandi er, at hesi fólk verða væl viðfarin, og at eingi mannarættindi verða brotin.

Tað ber væl til at tátta eitt sindur í, uttan at fara so langt sum at splitta familjur og taka til heilt absurdar avgerðir sum eitt nú at senda konu av landinum frá manni og soni. Tað er ikki bannað embætisfólki og politikkarum at sýna menniskjanligar kenslur og sýna menniskjanslig fyrilit. Vit kunnu ikki fyrst bjóða fólki higar at arbeiða fyri síðan at fara við teimum, sum vóru tey óynskt. Hetta er lítið sømiligt og sera óføroyskt. Tá vit hartil hugsa um, at føroyingar í túsundtali starvast uttanlanda, so verður hesin politikkur heilt groteskur. Tað er tú gleðiligt at politisk semja nú er gjørd um at orða ein føroyskan útlendingapolitikk. Allar útvísingar eiga at verða lagdar til burtur, meðan hetta arbeiði fer fram. Tey, sum ynskja at verða integrerað, eiga at fáa tilboðið at vera verandi her. Hini fara av sær sjálvum av aftur landinum, tá ella um arbeiðið minkar. Hetta regulerar seg av sær sjálvum. Nú bíða vit eftir einum vælskipaðum, humanum og siviliseraðum útlendingapolitikki sum sømir seg mentaðar og framkomnari tjóð.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Alment bræv til politisku flokkarnar

Ítróttasamband Føroya
He in Mortensen, forseti
Sølvi R. Hansen, ítróttará gevi

Føroyski ítrótturin er í djúpari kreppu. Landsins myndugleikar eru farnir undir at reka útlendsk ítróttarfólk av landinum.

Dagliga frættist um leikarar og venjarar hjá feløgum kring landið, ið verða riknir av landinum, tí ítróttarfeløgini ikki megna at gjalda teimum ta løn, sum landsstýrismaðurin í Innlendismálum krevur, at tey skulu fáa. At tey hava annað arbeiði við síðuna av, og í allar mátar trívast væl í Føroyum, tykist ongan týdning at hava.

Tað er ein gáta, at landsstýrismaðurin í Innlendismálum kann meta útlendsk ítróttafólk og venjarar vera ein trupulleika fyri føroyska samfelagi . Í flestu førum hava tey hinvegin avgerandi týdning fyri trivna og menning hjá okkara unga fólki.

Hóast Ítróttasamband Føroya, sersambond og feløg fleiri ferðir hava heitt á landsstýrismannin í innlendismálum og Løgmann, ið er verji hjá ítróttini, at gera nakað við málið, hendir einki.

Tað frættist um eina avtalu, sum landsstýrið hevur gjørt við donsku stjórnina. Eingin hevur enn víst ítróttinum hesa avtaluna. Men feløgini merkja dagliga sviðan av henni. Ítrótturin er vónbrotin av, at landsins myndugleikar gera avtalur, ið beinleiðis skaða ítróttin. Sum skilst eru tað føroysku myndugleikarnir, ið einsamallir hava ynskt hesa avtaluna. Landsstýrismaðurin hevur fört fram, at hann bert ger tað, sum »hansara politiska bakland« ynskir. Og løgmaður hevur fleiri ferðir staðfest, at samgongan stendur aftanfyri landsstýrismannin í hesum ítøkiliga málinum.

Tí vil Ítróttasamband Føroya við hesum heita á politisku flokkarnar hvør sær alment at svara Føroya fólki, um teir taka undir við førda politikinum hjá landsstýrismanninum í innlendismálum, og nú hjá Løgmanni eisini.

Er tað veruliga so galið, at flokkarnir á tingi standa saman um hesa herferðina móti føroyskum ítrótti?

Um teir halda, at skeivt verður farið fram, eiga teir at steðga hesum sum skjótast, áðrenn óbótaligur skaði verður gjørdur. So mikið skylda teir fólkavaldu fólkinum.

Fyrispurningur til bæði høgan og lágan

Dia Ellindsson
Runavík

Er innlendismálaráðið bliið til eina útflutningsfyritøku við Hunter Jógvan við Keldu Export sum stjóri við sínum 17 sangara kóri?

Tað ber ikki til at handla við handilsvørum eins og við mannalagnum, her verður hugsað um ítróttarfólk og arbeiðsmegi uttan úr heimi.

Genta situr á garði

Genta við síðum, myrkum hári
og reyðum skóm
situr á garðinum og skoðar háhúsini
eitt skelti lýsir í myrkrinum
meðan peningagreðingarnir og
teirra leigusveinar
vaska tjóvagóðsið
og teirra hendur
proletararnir knógva undir tungum
trælaoki
í túsundatali líða neyð og doyggja
í hungri
tyngjandi drepandi einsemi
luksusdýrini stuttleika sær
við gleðisgentum
vesturheimsins ómettandi girnd
børn og ungdómur søluvøra
fyri at nøkta hesi illtýggini
gentan rópar: tilfeingi
tjóvagóðsið aftur til fólkið!
alt tit hava er fólksins ogn
taki tykkara skarn, eiturevni
og 110 milliónir landminir
stórreiðaradótturin og
dóttur vápnframleiðslubølmenni
drekka heita kakamjólk
reiðarin og vápnframleiðslubølmenni
spæla sær við krígsleiku
ein úlvur í seyðaskinni stendur hjá teim
ein eingil situr og grætur við eldstaðin
á vøllinum við garðin bíðar skúlataskan.

Sólmundur Joensen – juli 2004

Innsent tilfar
Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum blaðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Figgjarleiðari: Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Hans Kárason Mikkelsen
hans@sosialurin.fo
Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
Sosialurin í Vágum:
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásetta freistir.
Framihjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Nissan og mamma hansara!

Hallur Hjalgrímsson

Heilt frá barni av havi eg, og flest øll við mær, verið av tí fatan, at jólamenn ella nissur búðu í Grønlandi, ella sum tað er her heima hjá okkum, í fjøllunum. Hettar kann undirritaði nú staðfesta, at so er ikki í øllum førum. Tí eg haldi meg hava »spottað« eina á flogvøllinum.

Tað sum vendir niður vendir upp!
Eg má nokk heldur byrja við byrjanini, og so taka tað har frá. Here we go:

Unnusta mín var á ólavsøku úti fyri eina sera dramatiskari hending, ið gjørdi, at hon var flutt á landsjúkrahúsið, og longu dagin eftir var hon send niður á ríkissjúkrahúsið. Eg fór sum vera man glaðbeintur glorvandi við, vildi ikki lata hana vera einsamalla í stóra og øðiliga kongsins-Keypmannahavn. Nú men vit komu so niður í øllum góðum, unnustan bleiv løgd undir skurð, og longu 5. dagin, 4. august, kundu vit flúgva heimaftur, tað er nú at vit rena okkum nissumannin og mammuna.

Tað skal sigast, at mær dámar ikki nakað serliga væl at flúgva, so eg má viðganga, at eg var heldur enn ikki moyrur, táið vit um síðir fingu fast undir føturnar.

Tá vit so langt um leingi høvdu fingið viðføri og skuldu fara gjøgnum tollin, sá eg tað sum eg allatíðina hevði verið beingin fyri, nissumannin. Og alt fyri eitt visti eg, hvatið klokkan hevði sligið. Har var neyvan nakað at gera, hugsadi eg. Nú var nokk ikki annað at gera, enn at byrja at lata seg úr øllum klæðunum, nissumaðurin er jú vanur at biða ein um at lata seg úr. Eg skal siga tykkum alt fyri eitt, at hettar er ikki nøkur vanlig nissa, nei tað sum vendir niður vendur upp, tí hendan nissan tekur frá fólki, meðan allar aðrar nissur leggja lívið í at geva. Kanska hevur hendan fingið sekkin sum nissa og fór tí at arbeiða sum tollari í staðin, ella hvat veit eg, hann stendur so í øllum førum har á flogvøllinum og ger sær dalt av teimum, ið kanska síggja eitt sindur øðrvísi út, ella sum hann heldur síggja »kriminell« út. Eg kann í øllum førum siga tað, at fyri mín part er talan um ikki minni enn regulera forfylging. Hendan nissan hevur verið persónliga úti eftir mær síðani mamma lovaði mær at flúgva einsamallan. Og sum um tað ikki er ringt nokk, so hevur hann Guð hjálpi mær nú eisini fingið mammu sína at stuðla sær í hesari herferð. Har var so eitt kvendi, ið stóð og skræddi seg undir liðuni á nissuni. Hon er vist nokk eisini tollari, Guð má vita, hvat tað er fyri eitt ólukkudýr, ið hevur sett mammuna sum tollara. Í mínum stilla sinni hugsaði eg við mær, at tað er kanska ikki so løgið, at tollvaldið ikki fær fatur á fleiri veruligum lógbrótarum, tey hava jú sett eina reyðharda nissu og mammu hansara at ansa eftir á flogvøllinum, Guð forbarmi seg.

Ikki úr klæðunum
Vit hava so fingið viðføri í øllum góðum og ganga so yvir til útgongdina. Komin til har, ið tollararnir standa, fái eg eyga á tey bæði. Fyri mær virkar tað, sum at tey fullkomiliga missa tamarhaldið á sær sjálvum. Alt fyri eitt verða vit rópt yvir til diskin, og øll hini, ið eisini eru komin við flogfarinum, verða veitrað víðari. Øll kundu fara víðari uttan tey bæði »kriminellu«, sum tey nú høvdu fingið hógvarnar í. Nissan, hovin og ótiltalandi sum hann er, byrjar beinanvegin at spyrja spurningar, sum í veruleikanum einki hava við tað aktuellu støðuna at gera. Her hugsi eg um vanlig ting, sum ein væntar, at ein tollari eigur at spyrja, so sum: Hava tit nakað at tolla. Nei, tey vildu vita, hvar vit høvdu verið. Vit svaraðu sum var, at vit høvdu verið niðri í sjúkraørindum. Tað vildu tey so ikki rættuliga trúgva uppá. Tey hildu tað vera løgið, at vit bæði høvdu verið niðri, tá tað bara var ein av okkum, ið tørvaði læknahjálp. Men tápulingarnir gevast ikki her. Mamman vildi nú eisini vera við, at vit høvdu alt ov nógv viðføri, »tit hava jú bara verið niðri í 5 dagar«. Hvat hava tit brúkt alt hettar viðførið til?

Havi ikki í mínum døgum hoyrt ein so innantóman og láturligan spurning fyrr, í øllum førum ikki av vaksnum fólki. Hvat brúkar man klæðir til? Meginparturin av viðførinum var jú klæðir. Hvat skal man svara til ein tílíkan spurning? Eg má viðganga, at nú var eg í ferð við at missa tamarhaldið á mær sjálvum, hvussu í ólukkan skulu hesir báðir tápulingarnir kunna tryggja, at einki kemur ígjøgnum tollin, ið ikki skal koma?

Sum sagt so trúðu tey ikki einum orði, vit søgdu. Nú vildu tey hava skriftligt prógv fyri, at vit høvdu verið í DK í sjúkraørindum. Tað høvdu vit so ikki, men eg vil halda, at tá tað stendur ein persónur framman fyri tær við einari so stórari forbinding um armin, so átti tað at verið ein klokka sum fór at ringja eitt ella annað stað inni í hasum innan tómu tollaraheysunum, men nei, tað var so eiðasørt. Í staðin fyri at síggja støðuna, so sum hon var, so vildu nissan og mamma hansara nú hava at vita, hvat unnustan hevði inni í forbindingini. Um hattar ikki er óndsinnað forfylging, so veit eg ikki. Nú kundi eg ikki halda mær meira, so eg greiddi teimum frá, so týðuliga sum eg kundi, hvat eg helt um teirra framferð og tey sum heild. »Skulu tit við bussinum?« spurdu tey, hvat í ólukkan kemur tað tykkum við, um vit skula við bussinum ella um vit skulu á løbihjuli til Havnar? Eg bað tey gera tað, tey skuldu, so vit kundu sleppa avstað. Eg spurdi nissuna, um eg skuldi lata meg úr, tað ert tú jú vanur at biða um, men tað skuldi eg til mítt yvirraskilsi ikki. Kanska er tað tí, at har vóru fólk til staðar, ella hvat veit eg, so tað slapp eg altso frá. Tað einasta, tey funnu, var nakað av heiluvági og eina recept, sum unnustan hevði fingið við sær av hospitalinum niðri. Hesum komu tað eisini nógvir óhugnaligir og ikki minst óviðkomandi spurningar burturúr.

Niður aftur 22.8.2004
Sum sagt kann eg ikki góðtaka ta viðferð, eg og daman fingu á flogvøllinum 4.8.2004. Tó skal sigast, at hettar als ikki er nakað, ið kom bak upp á meg, eg havi jú verið sjikaneraður av hasari nissuni fyrr og verði tað óiva aftur. Kanska hevði tað verið ein idé at nýtt Nørrunu ístaðin. Tí hasari nazi-líknandi viðferðini, eg nú í skjótt nógv ár havi verið úti fyri, er ikki nakað, ið eg longur vil standa model til. Tað ið eg eri mest argur um, er at tað sýnist sum at tað nú eisini skal ganga út yvir gentu mína, og tað kann eingin finna seg í.

Hon skal niður aftur nú 22.8 til víðari viðgerð á Ríkissjúkarahúsinum. Eg haldi ikki, at eg fari við, so kanska hon fær frið at vera eitt vanligt ferðandi, tá hon kemur heim aftur um ca 14 dagar eftir at hon er farin. Eg haldi, at um eg taki ta avgerð at fara niður, so verður tað nokk sjóvegis, men den tid den sorg. Kanska átti eg at ringt til tey bæði og spurt, um tað var nakað eg kann taka við til tey næstu ferð eg komi heim loftvegis.

PS: Hettar bræv er ikki ein protest ímóti øllum tollarum, men bert til Nissuna og mammu hansara. Flestu tollarar, sum eg eri komin á tal við, eru hampafólk.

Nú tá ið eg hugsi um tað, so haldi eg, at tey luktaðu av einum hvørjum, kann ikki koma á júst hvat tað er. Tað kann sjálvsagt eisini vera mínari nøs, tað er galið við. Man luktar so nógv nú á døgum.

Sólmundur Joensen – juli 2004

Iskra- Neistin

Gjøgnum meg streymar urkraftin
kollveltingarliga solidariska
heimsmyndin
frælsisbálið glógvandi mars 1917

komi gangandi í einsemi
mót eystri
har lívið byrjar
í nívandi vetrarkulda
tann reyði tráðurin er leiðvísari
syngjandi glað sterk striðsfús eygu
steðgi við eina lítla friðarliga
hálmtakta smáttu
boðin innar
her sita mínir andsfelagar geisandi
logaglæma
stættastríðsins vegvísarar
sessist í tann samansjóðaða heita
ringin
felagsskapsins bál, reytt sterkt og
striðshugað
hoyri orðið iskra- neistin er kveiktur
frælsislogans týðuliga mál

kollveltingardagurin í havsbrúnni
men verður tálmaður
av høgravendum rithøvundum
líkasæla, evnisheimsins girnd
fákunna og eintáttað teknokrata
kapitalismunnar valdsmonopolum
tó kann einki steðga frælsisstríðnum
kollveltingin móti
imperialistisku stríðum og kúgan
tjóðskaparsocialismu og pacifismu

alt vald til fólkið
og virkin samogn

virka eftir førimuni
og njóta eftir tørvi

Sólmundur Joensen – juli 2004

HALDIÐ SOSIALIN

450,- um ársfjórðingin
- sparið **395,-**
í mun til leysasølu

600,- kr. um ársfjórðingin í Danmark
(500,- kr. fyri 1 ferð um vikuna - 5 bløð)

Sosialurin
ARGJAVEGUR 26 · POSTSMOGA 76 · 110-TÓRSHAVN · TEL 341800
FAX 341801 · POST@SOSIALURIN.FO · WWW.SOSIALURIN.FO

Ókeypis
Verður sent óposta Sosialurin rindar postgjaldið
64

Sosialurin
Postmoga 76
110 Tórshavn

Undirritaði teknar seg sum haldara av Sosialinum, og fær blaðið 5 ferðir um vikuna.

Navn: _____
Bústaður: _____
Postnr.: _____
Bygd/býur: _____
Telefon nr.: _____
Undirskrift: _____